Papcon er WC pappír
og køkspappír
úr bestu góðsku,
framleitt í Føroyum

Papcon er bíligast
og best
á marknaðinum

papcon
borgar
fyri góðsku

Blómubúðin
»FLORA«
Hoydalsvegur 8
Tórshavn
Telefon 16044

sendir um alt landið:
bukettir - plantir
kransar og
brúðarbukettir

Tógvhandilin
igloo
Landavegur 2
tlf. 15264

Setið peningin
í
FØROYA SPARIKASSA

Restorffs
Bryggjarí
tlf. 14728

svarar eisini aftan á
kl. 17.

ATLAS
Tlf.:
ATLAS
14477
BÚÐIN

Framhald av síðu 13

kere ville at norske soldater skulle okkupere Færøyene. Engelskmenne ville ikke det, Churchill hadde lovet at passe på øyene. Kom nordmennene først i land ville de, mente mange, gjøre krav på Færøyene efter krigen. Det skulle vi gjort. Et kort besøk på disse rare, spennede øyene har overbevist meg om at vi der kan finne mer uforfalskede gammelnordmenn enn noet annet sted de hører til hos Norge.

Sissel Lange-Nielsen dregur síðani fram sum nakað serstaka áhugavert hendingina í juni 1940, tá ið bretar á Skálafjørðinum løgdust á svenskt herskipafylgi, ið kom úr Italia á veg heim til Svørikis. Um hesa hending vita fólk aðrastaðni í Norðurlondum lítið um, heldur ummælarin, sum eisini viðger ymsar politiskar hendingar í Føroyum undir og aftaná kríggið seinna, og hon endar ummæli sítt við hesi lýsing av »Færøerne — en del af Norden«:

— Den færøyske journalisten Eiden Müller trekker fram mange interessante episoder fra færøysk samtidshistorie — en interessant bok for alle som har tapt sitt hjerte til Færøyene. Kanskje kan den også vinne nye nysgjerrige . . .

Pensionista-felagið hevur fund

Pensionistafelagið fyri Suðuroyar Norðaru helvt hevur sín fyrsta fund aftaná summarfrítíðina hóskvøldið 1. september kl. 19.30 í skúlanum í Trongisvági.

Felagið hevur umleið 100 limir.

Sat fimm korter á kjøli

Eftir at hava sitið í fimm korter á kjøli á einum fýramannafari sunnudagin, kom ein deksbátur fram við, og ein 25 ára gamal klaksvíkingur var bjargaður.

— Eg haldi ikki, at eg var bangin. Eg fekk ikki tíð til tað. Tað var verri, um panikkur var komin í meg, sigur tann 25 ára gamli Guttormur Jacobsen.

Hann var sunnudagin farin úr Klaksvík til Kunoyar eftir fólki. Men við flesjarnar nakað norðan fyri Kunoyarnes fekk hann eina glæðu og báturin holvdist.

— Har var einki at gera. Báturin drakk beinanvegin og fór runt eftir heilt fáum sekundum.

Guttormur blakaði seg út í borðið, tá glæðan tók. Hann heldur at hann má hava verið uttan fyri stokkin, tá báturin holvdist. Hann fór nakað niður í sjógvin, men tók so nøkur tøk upp og fekk fatur í súðunum, og slapp upp á kjøl.

Men hetta var tungt, tí hann var bæði í oljuklæðum og gummistyvlum. Men komin upp á kjøl, skræddi hann seg úr oljubuksunum, sum vóru reyðar, og royndi at veitra við teimum, sum eingin sá hann.

Báturin rak skjótt suður um Kunoyarnes, og Guttormur roknaði við, at onkur bilur fór at síggja hann av Ánavegnum. Men hóast nógv ferðsla var, bar eingin eyga við hann.

Men Guttormur uggaði seg við, at tað kundi ikki fara at ganga so leingi til Tróndur kom úr Lorvík, tí tað var ikki so langt síðani at hann var farin av Klaksvíkini.

Tað var kortini ikki Tróndur, sum kom framvið og uppdagaði mannin á kjølinum. Tað var deksbáturin Nestangi, sum kom úr Kunoy, sum á Guttorm.

Hvør trevil var sjálvandi vátur, og Guttormur sigur, at hann ristist av kulda, men bangin var hann ikki. Hann hevði úr at gera við at halda bátinum, soleiðis at hann ikki fór runt aftur.

Báturin hevði ein leysamotor, men hann bleiv sitandi í. Einasta sum Guttorm misti úr bátinum vóru tvey jørn at seta á stokkin til runddorg.

Veðrið var annars gott. Guttormur sigur, at tað var næstan stilli, tá hann fór av Klaksvík. Tað sindri sum var av vindi, mól millum útsynning og vestan, men hann má vera komin høgt, tá óhappið hendi, og tað var blivið nakað gjálvut í sjónum. Tá deksbáturin kom til, varð fýramannafarið fingið á rættkjøl og sleipað inn.

jo-mo


Vit eru nú Rank Xerox umboð í Føroyum

Framyvir kunnu tygum keypa bæði Rank Xerox kopimaskinur, tær nýggju Rank Xerox fullelektronisku skrivimaskinurnar og tað originala Rank Xerox kopipappirið frá okkum.


Tað er sjálvsagt fyri okkum ógvuliga gleðiligt at hava fingið einaumboðið av framleiðsluni hjá eini fyritoku sum hevur so gott orð á sær, og vit gleða okkum at vísa tygum tað stóra og góða úrvælið. Her bert nokur dømi:



Xerox 620: Tann fullelektroniska skrivimaskinan, ið er uttan sín líka bæði í møguleikum og prísi.



Xerox 1020: Kopimaskinan, sum er so lítil, at hon kann standa á skriviborði tygara - uttan at vera fyri.



Xerox 1035: Borðmodellið, sum bæði upp- og niðuravmyndar og sum sjálv sigur frá hvussu hon skal nýtast.

Opið Hús. Komið og síggið og roynið

Vit hava opið hús mikudagin 31. august, hósdagin 1. sept. og friggjadagin 2. september frá kl. 10 til 18, og vit gleða okkum at siggja oll áhugaði til eina demonstration.

P/F FARODANE & CO
skrivstovumaskinur
Hoyvík - 3800 Tórshavn Tlf. 1 1414

